NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Nils Malmros 60 ár

Týsdagin 5. oktober fylti kendi danski filmsleiktjórin og læknin Nils Malmros 60 ár.

Í Føroyum er hann best kendur fyri filmin »Barbara«, sum hann leikstjórnaði og bleiv tikin upp í Føroyum í 1997.

Nils Malmros er føddur í Árhus í 1944, har hann tók studentsprógv í 1964.

Hann er sjálvlærdur filmsleikstjóri og bleiv liðugur sum lækni í 1987.

Læknaútbúgvingin tók honum meira enn 22 ár, tí lærutíðin varð í heilum avbrotin, tá hann leikstjórnaði teimum ymisku filmunum, hann gjørdi hesi árini.

Hann er helst einasti danski læknin, sum tá hann varð liðugur við útbúgvingina, arbeiddi sum vikarur fyri ein eykalækna.

Hansara lív hevur verið ein samanseting av at arbeiða sum lækni og sum filmsleikstjóri. Hann hevur altið gjørt sær stóran ómak fyri at innliva seg í teir filmar, hann hevur leikstjórnað.

Áðrenn hann gjørdi filmin um skaldsøguna »Barbara«, eftir Jørgen Frantz Jacobsen, arbeiddi hann sum lækni í Føroyum, meðan hann í síni frítíð fyrireikaði seg til upptøkurnar til filmin. »Barbara« bleiv dýrasti filmur við danskari talu í søguni.

Eisini seinni, tá hann fyrireikaði filmin »At kende sandheden«, sum var eitt portrett av pápanum, Richard Malmros, sum eisini var lækni og doyði í 2000, arbeiddi hann á somu deild, sum pápin hevði arbeitt á, fyri at fáa betri innlit í umstøðurnar hjá honum.

Niles Malmros hevur fingið hópin av virðislønum fyri sínar filmar. Hann fekk t.d. virðirløn fyri filmin »Lars Ole, 5c« í 1973, »Drenge« í 1977, »Skønheden og udyret« í 1983, og »Kærlighedend smærte« í 1992.

Filmirnir »Kundskabens træ« sum hann gjørdi í 1981, og »At kende sandheden« í 2002, verða mettir sum sonn meistaraverk.

Nils Malmros giftist í 1982 við Marianne Tromholt, sum er lærari. Tey eiga eingi børn, men eru sera virkin í mentanarlívinum í Árhus.

Nils Malmros er ein av høvuðsmonnunum aftan fyri hugskotið um at gera ein stóran filmsídnað í Árhus undir navninum »Filmby Århus«.

Í løtuni fyrireikar hann ein komandi film, »Kærestesorger«, sum er um tíðina, tá hann gekk á studentaskúla.

Sp/f Bil Mini-Taxi:

Suni vann ferðaseðilin

Suni Bjartalið fekk at vita frá bilføraranum, Árna Vang, at hann skuldi ikki gjalda fyri túrin, og at hann hevði vunnið ein Apex-ferðaseðil frá Atlantic Airways

Mynd: Karlon Winther

Síðan 14. september 2004 hevur Sp/f Bil Mini-Taxi skipað fyri eini kapping, har kundi nr. 2500 vinnur ein Apex-ferðaseðil við Atlantic Airways. Hósdagin 7. oktober var Suni Bjartalíð úr Klaksvík ein av hepnu vinnarunum

Tá klaksvíkingurin Suni Bjartalið kom á Farstøðina í Havn hósdagin 7. oktober og leigaði sær ein hýruvogn út á Landssjúkrahúsið frá bilstøðini Bil Mini-Taxi, visti hann ikki, at hann hevði vunnið ein ferðaseðil frá Atlantic Airways.

Tá Suni skuldi gjalda fyri túrin, fekk hann at vita frá bilføraranum, at túrurin var ókeypis, og hann hevði vunnið ein Apex-ferðaseðil frá Atlantic Airways. Orsøkin var, at hann var kundi nr. 2500 hjá Sp/f Bil Mini-Taxi, síðan kappingin byrjaði tann 14 september.

Talan er bert um innringdar túrar, ella har fólk koma á støðina og biðja um hýruvogn.

Við í vinninginum er koyring til og frá Flogvøllinum, um vinnarin býr har sum koyrandi er til. Í hesum føri verður Suni heintaður í Leirvík og koyrdur vestur á Flogvøllin.

Kappingin byrjaði 14. september og verður fram til 14. november, so nakrir vinnarar verða afturat, áðrenn kappingin endar.

Jákup avloysir Osvald á Sundsverkinum

Fríggjadagin 1. oktober legði Osvald Hansen, verkmeistari á Sundsverkinum, frá sær, og samstundis tók 1. meistari á verkinum, Jákup Sørensen, við sum verkmeistari. Osvald Hansen er 67 ár og hevur starvast hjá SEV síðani 1965, tá hann byrjaði sum verkmeistari á Havnarverkinum.

Hann heldur fram við ymsum fyrifallandi arbeiði á Sundsverkinum til hann hevur verið í starvi hjá SEV í 40 ár 31. mai næsta ár.

Jákup Sørensen í Havn er maðurin, sum fríggjadagin fekk lyklarnar til Sundverkið frá Osvaldi Hansen, og sum harvið tók við sum verkmeistari á Sundi. Jákup Sørensen hevur verið 1. meistari á verkinum síðani 1984, og hann hevur starvast sum maskinmeistari á Sundi síðani 1978.

Tá Jákup Sørensen setti seg í verkmeistarasessin, tók Gudmar Joensen av Signabø, sum frammanundan starvaðist sum maskinmeistari á Sundi, við sum 1. meistari á verkinum.

Dagurin

9. Dionysius, deyður umleið ár 258. Hann varð vígdur til biskup av pávanum Fabiani og fór til Fraklands sum trúboðari. Varð saman við tveimum øðrum hálshøgdur á tí staðnum, sum nú eitur Montmatre, ið merkir *martýrfjallið*. Best kenda halgisøgan um Dionysius er, at hann eftir at vera hálshøgdur sjálvur bar høvd sítt til tann staðin, hann vildi verða grivin. Har var kirkjan St. Denis bygd.
Símun av skarði doyði hendan dagin í 1942.

10. oktober. Gereon, deyður umleið ár 300. Eftir halgisøguni kristin herhøvdingi, sum varð tikin av døgum.

11. oktober. Nikatius. Grikki, sum í 2. øld boðaði evangeliið í Suðurfraklandi og stovnaði kirkjulið og saman við øðrum og bygdi kirkjur m.a. í Lyon. Hann og ein av monnum hansara, Probus, sum eisini hevur staðið í álmanakkanum, vóru tiknir av døgum av uppøstum heidningum.
Nólsoyar Páll varð doyptur hendan dagin í 1766.

ítróttur

Nr. 193 • leygardagur • 9. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Teir somu ellivu

Talan verður allarhelst bert um taktiskar justeringar - og ikki umfatandi broytingar - á landsliðnum hesaferð

CYPROS-FØROYAR
Jákup Mørk

Talan verður helst ikki um tær kollveltandi broytingarnar á landsliðnum hesaferð

Nicosia, Cypros: Ein av føstu spurningunum, sum eru frammi, tá fótbóltslandsliðið skal spæla, plagar at vera, hvørjir teir ellivu verða, sum landsliðsvenjarin velur til at byrja inni á á vøllinum.

Tann spurningurin tykist tó vera minni hesaferð, enn hann so ofta hevur verið. Bæði tí leikarahópurin sum heild er sloppin sera væl frá skaðum hesaferð, men eisini tí liðið í seinasta dystinum - tað var móti Fraklandi - sýndi nakað av tí besta, sum føroyska liðið hevur spælt seinastu árini.

Tí liggja ikki tær heilt stóru broytingarnar í kortinum, tó at talan helst verður um onkrar justeringar, sum kunnu flyta liðið longur niðan á vøllin. Her vóru okkara í útgangsstøðu í eini verjukendari 4-5-1 í dystinum móti Fraklandi, men tann parturin verður helst broyttur til 4-4-2 hesaferð, tó at fólkið helst verður tað sama.

Skaðar hevur talan als ikki verið um á ferðini, og sum heild hava fysioterapeutarnir havt eina toluliga lætta ferð higartil. Hósmorgunin fekk Rógvi Jacobsen eitt lítið trælar, og sama kvøldið steðgaði Claus Bech Jørgensen tíðliga við venjingini, tí hann var nakað stívur um ryggin, men talan skuldi tó ikki verið um nakrar álvarsligar skaðar hjá nøkurm teirra. Og í øllum førum verður roknað við, at teir eru tøkir leygardagin.

Tað merkir, at Jákup Mikkelsen heldur fast um sítt pláss í málinum. Pól Thorsteinsson og Súni Olsen verða í hvør sínum borði í verjuni. Í miðverjuni verða tað so Óli Johannesen og Jón Rói Jacobsen, sum skulu ansa eftir cypriotisku álopsleikarunum. Í hjartanum á sentrala miðvøllinum verða sum vant Fróði Benjaminsen og Julian Johnsson, meðan kantarnir so verða mannaði av Jákup á Borg og Claus Bech Jørgensen. Og at enda verða tað so helst Jónhard Frederiksberg og Rógvi Jacobsen, sum fara at manna føroyska álopið.

Hava veikleikar

Sum nevnt í blaðnum í gjár, so er fótbólturin, sum cypriotar spæla, tann vanligi suðurlendski fótbóltsstílurin, har denturin verður lagdur á skjótt tekniskt spæl. Júst tann fótbólturin plagar ikki at vera tað, sum okkara monnum dámar best, men hinvegin tykist tað vera soleiðis, at føroysku venjararnir hava hugsa um onkrar hættir, sum kunnu vera við til at betra um føroysku møguleikarnar.

– Vit hava hugt eftir sjónbandi av teirra dystum, og sum heild er talan um eitt gott lið. Skal nakar veikleiki nevnast so er tað, at teir tykjast fleiri ferðir at missa skipanina í verjuspælinum, tá liðið flytir seg niðan eftir vøllinum. Og tað kunnu vit vónandi gera okkum dælt av, segði Jógvan Martin Olsen, tá vit eftir seinnu venjingina hósdagin fingu orðið á hann.

Tað merkir helst, at ein av týdningarmestu føroysku leikarunum verður Súni Olsen, sum hevur útgangsstøði á vinstra bakki. Við evnunum hjá sær at leggja millimetra-neyvar sendingar yvir allan vøllin, er als ikki óhugsandi, at long skift móti eini - vónandi - illa skipaðari móstøðuverju kunnu vera tað, sum skræðir verjupartin hjá móstøðuliðnum upp. Hvørt hetta so fer at eydnast, er ein annar spurningur, og hesin veruður so ikki svaraður fyrr enn leygarkvøldið.

Claus Bech Jørgensen er einasti leikarin, sum ikki hevur vant við fullari ferð, men roknað verður ikki við, at hetta fer at bila leygardagin